

# EG VIL SKAPA **NÝGGJAR** FYRITØKUR



HANN VAR **STJÓRI** Í ATLANTIC PETROLEUM Í **11 ÁR**, MEN Í NOVEMBER Í FJØR VAR TÍÐIN Í **FYRSTA** FØROYSKA **OLJUFELAGNUM** RUNNIN. NÚ ER HANN STJÓRI Í **NÝGGJA** FØROYSKA BRYGGJARÍNUM, **OKKARA**, SUM VÓNAR AT KOMA Á **MARKNAÐIN** VIÐ FYRSTU **ØLUNUM** Í JUNI. **WILHELM PETERSEN** HEVUR FLEIRI FERÐIR VERIÐ VIÐ, TÁ **BROTIÐ** VARÐ UPP ÚR NÝGGJUM, OG TAÐ **DÁMAR** HON EISINI **BEST** – EG VIL **SKAPA** NÝGGJAR **FYRITØKUR**, OG **BRYGGJARÍIÐ** ER EIN SPENNANDI NÝGGJ **FYRITØKA**, SIGUR HANN



**NÝTT BRYGGJARÍ**

**Uni Arge**
uniarge@gmail.com

Segði onkur olja, so slapst illa undan eisini at siga Wilhelm Petersen.

Soleiðis var lagið heilt frá 1998, tá Atlantic Petroleum legði til brots at fáa lut í væntaða føroyska oljuævintýrinum, til november 2009, tá felagið brádliga boðaði keypsskálunum frá, at Wilhelm Petersen var farin frá sum stjóri. 11 ár í stjórasessinum í fyrsta føroyska oljufelagnum vóru at enda komin, og tann 48 ára gamli vestmenningurin kundi taka seg aftur, kaga upp í himmalin eina løtu og spyrja, hvat nú skuldi henda.

Hann sat ikki leingi og skimaðist upp í ský, tí bara fáar vikur seinni vóru boð eftir honum at fáa eina nýggja fyritøku á føtur. Thorshavns Mælkeforsyning & Margarinefabrik við Høgna Jensen á odda var í ferð við at gera nýtt føroyskt bryggjarí í gamla eggvirkinum hjá Annfinni Brekkstein á Velbastað. Nýggj útgerð var keypt frá afturlatnum bryggjarí í Danmark at seta í bygningin, og nú skuldi kapitalbygnaðurin fáast upp á pláss.

Hesa uppgávu vildu stigtakararnir hava Wilhelm Petersen at loysa. Royndir sum stjóri hevði hann sum vera man úr Atlantic Petroleum, og við seks árum sum kredittleiðari í Føroya Sparikassa frá 1992 til 1998 í skjáttuni hevði hann eisini skil á fíggjarmálum. Harumframt var tað ein fyrimunur, at hann var útbúgvin sivilverkfrøðingur, hevði tikið fyrsta part av HD og kundi kalla seg doktara í framleiðslutøkni.

– Eg varð uppringdur í desember í fjør. Á fyrsta fundinum skuldi eg bara ráðgeva í sambandi við kapitalbygnaðin, men síðan øll fíggingin kom upp á pláss í februar, eri eg vorðin stjóri í fyritøkuni, og nú leggja vit seinastu hond á at fáa alla útgerðina roynda. Bryggjaríið riggar, sum tað skal, og nú royna vit tappiútgerðina og skulu hava seinastu góðkenningarnar upp á pláss. Vit vóna at senda fyrstu ølirnar á marknaðin í juni, sigur Wilhelm Petersen.

» *Fyrst skuldi eg bara ráðgeva, men síðan øll fíggingin kom upp á pláss, eri eg vorðin stjóri*

## Bryggjað við nærlagni

Gramlað hevur seinasta hálva árið verið um, at eitt nýtt bryggjarí skuldi fara at geva Føroya Bjór kapping á marknaðinum, men lítið ítøkiligt er komið fram um ætlanirnar. Í farnu viku brast tó fyri nev, tá bryggjaríið kunngjørdi navnið og nýggja búmerkið á egnari Facebook-síðu. »Bryggjað við nærlagni,« stendur uppi yvir navninum í búmerkinum, har gjørt eisini verður vart við, at talan er um smakk og góðsku.

Hóast tað kundi tykjast tilvildarligt, at bryggjaríið á Velbastað brádliga fór at gera um seg á Facebook, so var tað tilætlað. Bryggjaríið hevði fingið høvi at vera við á einum ølfestivali í Valby, og tá samleikin, sum Sendistovan hevur gjørt, longu var liðugur, og bryggjaríið hevði fingið góðkenning at bjóða fram fyrstu smakkiroyndirnar, varð bara lagt til brots við marknaðarføringini í Valby og á Facebook.

Við almannakunngerðingini byrjar eitt nýtt kapittul í søguni hjá Thorshavns Mælkeforsyning & Margarinefabrik, sum hevur fingist mest við at framleiða mjólk, ost og margarin í Havn, og Wilhelm Petersen hevur flutt seg úr oljuni í ølframleiðslu. Aftrat sær hevur fyrrverandi oljustjórin roynt fólk úr vinnulívinum. Formaður í nevndini er Óli Hansen, fyrrverandi nevndarformaður í Faroe Seafood. Hinir nevndarlimirnir eru Tummas Hanus Dam, stjóri, Høgni Jensen, eigari, og Peter Klemensen, bryggimeistari og nýliga fráfarin stjóri í Thisted Bryghus.

Við hesi samanseting heldur Wilhelm Petersen, at nýggja bryggjaríið skuldi verið í góðum hondum. Ikki minst er tað umráðandi, heldur hann, at bryggjaríið hevur fingið serkønt fólk uttaneftir at standa fyri framleiðsluni. Aftrat bryggimeistaranum verður diplombryggjarin, Bjarne Olsen, knýttur at bryggjarínum, og báðir fáa teir ovmikið at gera.

– Vit ætla at framleiða øll sløg av øli, pilsnara, gulløl og myrkt øl. Eisini fara vit at leggja dent á at framleiða ymisk sløg av serøli, so vit røkka einum so breiðum skara av kundum sum gjørligt,